# Nýggja skotið á javnaðarlistanum

**Hóast Heðin Mortensen ikki valdi at koma á javnaðarlistan, so verður familjan ikki við sviðið soð. Dóttur borgarstjóran í Havn tók nevnliga av, tá hon fekk boðið**

FÓLKATINGSVAL
*Jákup Mørk*

Elin Heðinsdóttir Joensen eitur feskasta valevnið á javnaðarlistanum, sum fyrrapartin týsdagin varð lati fjølmiðlunum.

Sum navnið bendir á, so er talan um dóttir nýkosna borgarstjóran í Havn, og sjálv dylir hon ikki fyri, at hetta at taka aktivt lut í politikki er nakað, sum meira ella minni er í genunum.

– Tað ger tað nokk. Spurningurin um uppstilling hevur eisini áður verið uppi og vent hjá okkum, men higartil havi eg aloftast hildið meg aftur, tí eg havi ikki vilja verið á sama lista, sum pápi mín. Hesaferð stillar hann so ikki upp, og so var tað ikki serliga trupult hjá mær at taka avgerðina.



*– Higartil havi eg aloftast hildið meg aftur, tí eg havi ikki vilja verið á sama lista, sum pápi mín. Hesaferð stillar hann so ikki upp, og so var tað ikki serliga trupult hjá mær at taka avgerðina, sigur Elin Heðinsdóttir Mortensen*

### Atkvøðuarvurin

At børn av politikarum velja at stilla upp, er á ongan hátt nakað nýtt fyribrigdi. Ofta er úrslitið eisini, at hesi fáa eina framúr byrjan upp á politisku karrieruna, har fleiri av atkvøðunum koma beinleiðis frá eldra ættarliðnum.

Í so máta man vónin hjá Elin ikki vera stórt øðrvísi, men hon leggur tó dent á, at navnið einsamalt ikki er nóg mikið.

– Tað er jú ringt at meta um, hvørjar atkvøður eg kann »fáa« frá pápa mínum. Sjálvandi skalt tú ikki vera blind, og rokna við onga at fáa, men hvussu nógvar, talan verður um, er torført at siga. Vit eru jú eisini tveir ymsir persónar, so mín vón er í øllum førum, at eg eisini kann fáa nakrar atkvøður, sum ikki koma tann vegin.

Og tað er eingin ivi um, at talan er um ein persón við eini breiðari kontaktflatu, sum nú er komin á lista C. Umframt dagliga starvið á Húsalánsgrunninum, hevur Elin í mong ár verið aktiv í fimleiki. Hon hevur sitið í nevndini í Havnar Fimleikafelag, og síðani 2001 hevur hon staðið á odda fyri Fimleikasambandinum. Hartil hevur hon í átta ár – harav fýra sum formaður – verið limur í barnaverndarnevndini hjá Tórshavnar Kommunu. Hon er limur í umboðsráðnum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, og eisini er hon partur av nevndini hjá Havnar Sjúkrakassa. So óvon við nevndararbeiði er hon so á ongan hátt.

Og einum politikara so líkt, so hevur hon eisini eina vón um at koma á Fólkating.

– Annars hevði eg ikki stilla upp. Eg rokni ikki við, at tað er nakar sum stillar upp, og ikki ætlar sær framat, staðfestir Elin Heðinsdóttir Joensen at enda.

### Sterkur listi

Talan tykist annars vera um ein sterkan lista, sum Javnaðarflokkurin hevur funnið fram, nú val aftur er á skránni.

Við undantakið av Sverra Midjord telur listin telur alla ting- og landsstýrismanning floksins, umframt at onnur væl kend nøvn eisini eru at finna. Eitt nú Thomas Arabo, Helena Dam á Neystabø, Eyðgunn Samuelsen og Mikkjal Sørensen, sum helst øll kunnu fáa nakað væl av atkvøðum í sín part.

## Listin hjá Javnaðarflokkinum

| Navn | Eftirnavn | Býur/bygd |
|---|---|---|
| Andrias | Petersen | Gøta |
| Sylverius | Jacobsen | Skáli |
| Sigfríður | Abrahamsen | Fuglafjørður |
| Sunnleivur | Højgaard | Runavík |
| Randi | í Jógvansstovu | Leirvík |
| Mamy Dahl | Sørensen | Viðareiði |
| Eyðgunn | Samuelsen | Klaksvík |
| Vilhelm | Johannesen | Klaksvík |
| Hans Pauli | Strøm | Vestmanna |
| Soffi | Egholm | Leynar |
| Thomas | Arabo | Signabøur |
| Napoleon | Magnussen | Miðvágur |
| Birgir | Hansen | Sørvágur |
| Kristian | Magnussen | Tórshavn |
| John | Johannessen | Tórshavn |
| Katrin Dahl | Jakobsen | Tórshavn |
| Helena D. Á | Neystabø | Tórshavn |
| Bjørg | Joensen | Tórshavn |
| Rigmor | Dam | Tórshavn |
| Elin Heðinsdóttir | Joensen | Tórshavn |
| Gerhard | Lognberg | Skopun |
| Jákup Birgir | Mohr | Sandur |
| Jóannes | Eidesgaard | Tvøroyri |
| Jónhild A. | Nielsen | Tvøroyri |
| Henrik | Old | Vágur |
| Mikkjal | Sørensen | Porkeri |

# Landsstýrismaður skal staðfesta setan av listaleiðara

**Formaðurin í stýrinum fyri Listasavnið vil ikki staðfesta setanina av nýggjum leiðara, og tí vil meirilutin í stýrinum nú hava landsstýrismannin við mentamálum at gera tað**

LISTASAVNIÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fýra fundir, nógv alment og óalment virksemi, men framvegis eingin endaliga avgerð.

Tað er gongdin í málinum um nýggja leiðaran fyri Listasavn Føroya.

Men nú hevur meirilutin í stýrinum fyri Listasavnið eftir øllum at fingið nóg mikið og fer at venda sær beinleiðis til landsstýrismannin við mentamálum fyri at fáa hann at staðfesta starvsetanina.

Tríggir av fýra limum í stýrinum fyri Listasavnið vilja hava Helga Fossádal í starvið, og hann er eisini umsøkjarin, sum Listafelagið og Myndalistafólkini hava stillað inn til starvið. Formaðurin í stýrinum er ímóti, tí hann heldur, at leiðarin á savninum skal hava listfrøðisliga útbúgving, og tað hevur Helgi Fossadal ikki.

Fýra ferðir hevur stýrið roynt at avgreitt málið, men tað er hvørja ferð endað við tí sama. Meirilutin vil hava Helga Fossádal settan, men formaðurin vil hava ein listfrøðing í starvið.

### Meirilutin ræður

Mentamálaráðið, sum velir formannin í stýrinum fyri Listasavn Føroya, hevur ikki viljað blandað seg upp í málið, men nú fær landsstýrismaðurin eina áheitan afturat. Og tað verður frá meirilutanum í stýrinum, sum vil hava Jógvan á Lakjuni at staðfesta avgerðina hjá meirilutanum.

Tað er tó ivasamt um, landsstýrismaðurin kann gera nakað, tí sambært viðtøkunum fyri Listasavn Føroya er tað stýrið, sum hevur endaligu ábyrgdina av viðurskiftunum á Listasavninum – eisini tá ið leiðari skal setast. Og avgerðir í stýrinum verða sambært viðtøkunum tiknar við vanligum meiriluta.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá formanninum í stýrinum fyri Listasavnið fyrrapartin týsdagin.

# Jógvan nýggjur verji hjá FUR

**– Føroya Ungdómsráð spælir sín leiklut væl, sum alment viðurkend rødd hjá børnum og ungum í Føroyum, sigur landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni**

UNGDÓMSMÁL
*Snorri Brend*

Hóast ein tíð er fráliðin, síðani Jógvan tók við sum mentamálaráðharri er hann nú vorðin verji hjá samstarvsfelagsskapinum Føroya Ungdómsráð, stytt FUR.

Hetta er ein felagsskapur, sum umboðar 19 landsfelagsskapir og 65 lokalfelag, sum íalt fevna um 5.000 ungfólk.

Landsstýrisfólkini í mentamálum hava altíð verið biðin um at vera verjar hjá FUR, og nú var túrurin so komin til Jógvan á Lakjuni. Og sum skilst á landsstýrismanninum so er hann sera fegin um tað arbeiðið, sum FUR ger.

### Dýrabærur samfelagsbólkur

Í takkarrøðu síni vildi hann ikki lova nakað, men ásannaði kortini tann týdning, sum ungdómsarbeiðið hevur í landinum.

Hann segði m.a. at hann nú kemur at vera eitt bindilið millum Føroya Ungdómsráð og teir politisku myndugleikarnar í viðurskiftum, sum hava við børn og ung at gera.

– Børnini og tey ungu er sera stórur samfelagsbólkur, og kanska eisini tann mest dýrabæri av teim øllum. Tað eru børnini og tey ungu, sum skulu bera samfelagið frameftir, og umráðandi er, at hesi hava góðar karmar at mennast til sunnar samfelagsborgarar. Men hetta er samstundis eisini ein samfelagsbólkur, ið ikki altíð fær tosað fyri seg í samfelagskjakinum.

– Her er tað, at Føroya Ungdómsráð hevur sín stóra leiklut sum alment viðurkend rødd hjá børnum og ungum. Og lat meg siga, at henda leiklut spælir Føroya Ungdómsráð væl. Tit eiga rós uppiborið fyri tey átøk, sum tit gjøgnum árini hava sett í verk. Eitt nú hava tit megnað at varpað ljós á eym evni, sum tó eru fundamental fyri tað álit, ið foreldur hava á ungdómsleiðararnar hvønn einasta dag. Tað skal lítið til fyri at bróta niður tað, sum bygt er upp gjøgnum fleiri ár, og hetta vita tit, segði Jógvan á Lakjuni m.a. í røðu síni.

Hann fekk her handaða eina gullnál, sum eitt tekin um at hann nú er vorðin verji hjá FUR.